# Kjak



Svenning av Lofti

## Ný-nazistarnir, Iran og Ísrael

Í Kristeligt Dagblad 8. mai stendur ein áhugaverd grein eftir Allan Sørensen, sum er tíðindamaður blaðsins í Miðeystri. Í greinini stendur, at eysturríksku nýnazistarnir verja atomætlan Irans. Felagsástøði hjá nýnazistunum og stjórnini í Iran er felags fíggindi teirra: Jødiska fólkið.

Sambandið millum nazistarnar og Iran er ikki púra nýtt. Undir seinna heimsbardaga gav upplýsingarherferð Hitlers út eitt nazistiskt tíðarrit í Iran, tí at "reinu" arisku týskararnir høvdu ætlanir um ein samskipaðan felagsskap við teir iransku ariarnar.

Høvuðsboðskapurin í tíðindaherferð Hitlers var bardagi Muhammeds profets móti jødisku íbúgvunum í Mekka. Hitler varð beinleiðis samanborin við Muhammed. Báðir vóru teir søgunnar stóru jødahatarar.

Sambært granskarum eru partar av iranska fólkinum ættaðir av ariskum ættarbólkum, sum fóru úr India og býttu seg sundur í tvey. Annar parturin búsettist í økinum, har Iran er, meðan hin kom til Norðureuropa.

Í dag eru tað so nýnazistarnir í Europa og Ahmadinejad, sum hava savnað seg saman í mótstøðuni móti Ísrael. Ahmadinejad hevur ferð eftir ferð endurtikið, at hansara ætlan er at týna jødiska státin, Ísrael.

Tá ið Iran fyri eini tveimum árum síðani skipaði fyri eini "øðrvísi" holocauststevnu, vóru eysturríkskir nýnazistar millum luttakararnar.

Í 1942 var muftiin í Jerusalem (leiðarin fyri muslimarnar har) í Berlin og prátaði við Hitler. Í nazistiska tíðarritinum "Der Stürmer" segði hann: Vit kunnu samanbera jødarnar við smittuberandi flogkykt. Tá ið ein ikki er so tætt hjá teimum, kunnu teir tykjast vera friðardýr, men verður ein stungin av teimum og smittaður við sjúkuni, so skal ein harðligari viðgerð nýtast."

Sanniliga, antijødiska søgan endurtekur seg. Iranski leiðarin boðar ferð eftir ferð frá ætlanum sínum, at týna jødiska fólkið, eins og Hitler gjørdi í bókini "Mein Kampf". Eins og tá yppa summir av leiðarum heimsins øksl í dag, tá ið Ahmadinejad, eins og Hitler, boðar frá ætlan síni at oyða Ísrael. Orðini gjørdust veruleiki 1944-45, tá ið hann varpaði allan heimin út í eitt ragnarok vegna maktgirnd og jødahatur. Ein skilir heimsins leiðarar, ið óttast fyri atomætlanini hjá Iran og Ahmadinejad.

***Í dag eru tað so nýnazistarnir í Europa og Ahmadinejad, sum hava savnað seg saman í mótstøðuni móti Ísrael***

Vegna Feløgini
Marner Lisberg og Jónsvein Knudsen

## Stríðast fyri okkara rættindum

*Viðmerking til skriv frá felagnum Nótaskip við heitinum »Nakrar viðmerkingar til makrelmálið«*

Vegna feløgini niðanfyri skulu vit koma við fylgjandi viðmerkingum til omanfyri nevnda skriv.

Tað undrar okkum almikið, at felagið Nótaskip metir seg ikki hava verið virkið í kjakinum um makrelin. Eftir okkara meting er felagið Nótaskip og sjónarmið tess komið væl og virðiliga til orðana um hetta mál í øllum miðlum, og serliga í loftbornu miðlunum.

Øll eru samd um, at makrelkvotan hjá føroyingum er ov lítil og má og skal økjast. Tað eru øll samd um. Men munur er á, hvussu feløgini meta, at hetta skal gerast.

Niðanfyri nevndu feløg eru av tí áskoðan, at makrelurin er rovfiskur sum kemur til Føroya um summarið at eta seg feitan. Í hesum átigildi tekur makrelurin ein stóran part av grundarlagnum undan lokalu botnfiskastovnunum.

Tað kann nevnast, at metingar vísa, at umleið 2 – 2,5 mill tons av makreli koma inn á føroyskt øki í umleið 4 mánaðir at eta. Føðin hjá makrelinum er, umframt yngulin hjá botnfiskastovnumum, sama føðin ið botnfiskastovnarnir liva av. Hugsast skal um, at tey umleið 2 – 2,5 mió. tonsini av makreli skulu sammetast við samlaðu støddina av botnfiskastovnunum, ið er á leið 0,3 mill tons. Tað vil siga at um makrelur og botnfiskur etur líka nógv, so ávirkar makrelurin umleið 2,5 ferðir so nógv sum botnfiskuri við Føroyar.

Tað sigur seg sjálvt, at henda støða er til stóran skaða fyri botnfiskastovnarnar, heimaflotan og harvið eisini allar føroyingar.

Vit hava fyrr víst á, at vit stuðla fiskimálaráðharranum í kravinum um, at vit skulu hava meira makrel.

Umframt hetta, so meta vit sum eina sjálvfylgju, at tað er heimaflotin, tann ið er skaðaraktur, ið fær ágóðan av vøkstrinum í markelkvotuni. Verandi praksis er, at allur botnfiskaflotin undir Føroyum skal ofrast, fyri at nakrir fáir skulu fáa so góð forhold, sum til ber. Hetta kann als ikki góðtakast.

At hetta skal fáa felagið Nótaskip at stúra fyri gongdini, skilja vit einki av. Eingin hevur gjørt krav uppá, at nótskipini skulu fáa minni enn teir fáa nú. Vit halda, at tað er sjálvsagt, at teir fáa teirra lut, ið er umleið 4% av heildarkvotuni. Tað er undir hesum fortreytum, at limir í Nótaskipum hava gjørt sínar íløgur, og tí meta vit, at hasi procentini skulu teir framhaldandi fáa.

Sera nógvar íløgur eru gjørdar, bæði á sjógvi og landi, av heimaflotanum í Føroyum. Allar hesar íløgur eru grundaðar á, at fiskiskapurin verður nøkunlunda normalur, og ikki ávirkaður av einum slíkum rovfiski sum makreli.

Undrunarvert er at lesa, at Nótaskip tekur upsafiskiskapin fram, sum um at teir ikki fiska upsa ella annan botnfisk. Nevnast kann at nótaskipini hava loyvi at fiska við sera smáum trolum við sera smáum meskum, "50 mm", á somu leið, sum botnfiskaflotin fiskar við smáum trolum við stórum meskum, "135 mm". Lutfallið millum gapini á trolunum hjá ávíkavist nóta- og botnfiskaflotanum er minst 50 : 1 So sera løgið skal vera, um ikki nótaflotin fiskar sín stóra part av botnfiskastovnunum undir Føroyum.

Tað skerst ikki burtur, at heimaflotin virkar í Føroyum við sera stórum ringvirkningum, og ætla vit eisini at økta kvotan av makreli skal koma føroyingum tilgóða. Vit hava ikki fyri neyðini at skula verða við at uppbyggja Noreg við at veiða innalaga hjá teimum, og at landa til teirra.

Vit kunnu ikki skilja grundgevingarnar um MCS góðkenning hjá Nótaskipum øðrvísi enn eina grundleggjandi misskiljing av støðuni. Sjálvandi koma rættindi føroyinga frammum eina umsókn um góðkenning av makrel fiskiskapinum. Veiðan verður ikki burðardygg undir nøkrum umstøðum, tí Ísland kemur at fiska allan teirra part oman á ásettu heildarkvotuna, umframt at ES tveitur nærum 2 ferðir føroysku kvotuna útaftur.

Rættindi føroyinga sum strandaland í makreli koma, sum øllum kunnugt, frá russum og teirra veiðu við Føroyar. Tí undrast vit á, at nótaskipini ikki eru fús at stríðast fyri rættindum føroyinga til makrelin. Vit rokna tó við, at tá á stendur so fara nótaskipini at bakka upp, eins og vit vænta at allir aðrir føroyingar gera.

Vit kunnu boða frá, at vit fara at rigga til og stríðast fyri rættindum okkara og føroyinga, so skjótt sum vit fáa møguleika til hetta.w

EYSTUROYAR BETONG
- grundir
- trappur
- dekk
- garðar
- múrar
- tún
o.a. betongarbeiði væl úr hondum greitt fyri kappingarførar prísir. Tilboð verða givin
TELEFON 56 20 70 / 56 20 71

KLETT ADVOKATAR
JULIANNA KLETT · JÓHAN J. LAMHAUGE

Vørugoymsla til sølu

Vegna klædnahandilin Sp/f Jungmann í konkurs verður vørugoymsla (klædnagoymsla) og innbúgv lýst til sølu.

Nærri fæst at vita við at venda sær til Klett Advokatar á tlf. 31 17 44 ella lamhauge@klett.fo

Bringsnagøta 21 · Postboks 62 · 110 Tórshavn · Tel 311744
Faks 318844 · www.klett.fo · klett@klett.fo